# Eg og familjan – ein bókalisti

**Nógvar góðar barnabøkur, sum kunnu hjálpa at seta orð á í sambandi við hjúnaskilnað, donorbørn, ælabogafamiljur, ættleiðing, samanførdar familjur, allar møguligar familjur.**

## Ymiskar familjur

**Hin stóra bókin um familjur**
Mary Hoffman
Myndabók. Familjur eru ymiskar. Vit fara við teimum at ferðast, til arbeiðis, í skúla, og fáa eitt sindur at vita um kelidjór, kenslur, ættartræ og nógv annað








**9 måder at få børn på**
Vibe Juul Sannig (61.26)
Myndabók. Ulrikke vitjar abba, og hann dugir væl at svara øllum spurningunum hjá henni – t.d. um, hvussu børn verða til. Myndabók frá 5 ár

**Bogen om at få søskende**
Maria Frensborg
Myndabók. Nóa skal vera stóribeiggi, og hann gleðir seg. Samstundis hava Nóa og hini í barnagarðinum eina rúgvu av spurningum. Tí hvussu kom barnið inn í búkin, og hvussu sleppur tað út aftur?

**Familie på 37 måder**
Dorte Sofie Mørk Emus (30.175)
Veitst tú, hvat ein ælabogafamilja er, ella veitst tú, hvar heimsins størsta familja býr? Les hesa bókina, so fært tú alt møguligt at vita um ymiskar familjur. Til 8-10 ára gomul

**Sortemis på strejftog med fantastiske familier**
Maria Löfgren
Myndabók. Vit vitja níggju ymiskar familjur og síggja, hvat hendir hjá teimum. Hugnalig og innbjóðandi myndabók til 3-6 ára gomul børn

**Æggedreng**
Lars Daneskov
Myndabók. Villy byrjar í skúlanum, og hini hava pappforeldur, tvær mammur, sum hava keypt eitt egg, eyka foreldur í einum øðrum landi, ella enntá ein pápa, sum er ein donut (donorur). Villy hevur bara ein pápa og eina mammu, men hann kundi hugsað sær at verið okkurt serligt, akkurát sum øll hini

## Hjúnaskilnaður










**Vitello fær ein fosturpápa**
Kim Fupz Aakeson
Myndabók. Ikki er tað altíð lætt at vera Vitello. Nú hevur hann sæð mammu sína standa niðri við garðin og mussa ein fremmandan mann. Maðurin eitur Gregers og er skallutur. Vitello er als ikki glaður, tí hann eigur jú longu ein pápa, sum er bæði eitt vituggi og ein supereingil. Vinkonan Kamma sigur, at nú fer hann at fáa ein fosturpápa, og tað hevur Vitello als ikki brúk fyri. Men so er tað tað, at Gregers eigur ein sportsbil ...

**Albert er skilt: om børn og skilsmisse**
Else Marie Schmidt Andersen
Átta søgur um børn, sum hava foreldur, sum eru farin frá hvørjum øðrum. Bókin leggur upp til samrøðu og hevur eftirmæli til tey vaksnu

**Hjemme hos mor får jeg altid sushi**
Anne Sofie Hammer
Myndabók. Magda er skiftisbarn, eina viku hjá babba, og eina viku hjá mammu. Leygarmorgunin byrjar hjá babba, men Magda er køld og vil fegin liggja eina løtu í songini hjá honum, tí heima hjá mammu er nógv heitari

**Mila har to senge**
Judith Koppens
Myndabók. Mila býr í tveimum støðum. Hon hevur eitt hús, eitt kamar og eina song bæði hjá pápanum og hjá mammuni, har hon skiftir ímillum at búgva. Viðhvørt er munur á, hvussu tey gera ymiskt, men til alla lukku elska tey bæði Milu líka nógv

**Nannas to værelser. Om at finde ud af det hele, når far og mor flytter fra hinanden**
Jannie Kildested
Myndabók. Foreldrini hjá Nannu verða skild, men av tí at tey klandrast ov illa um, hvussu ofta Nanna og beiggin skulu vera hjá pápanum, fáa tey hjálp frá einum sálarfrøðingi hjá myndugleikunum

**To af alting**
Hanne Kvist
Myndabók. Ein drongur hevur ein hund, sum eitur Uffe. Hann hevur eisini eina mammu og ein pápa, sum skulu skiljast, og nú halda tey, at hann skal hava tvey av øllum

**Troldegrene**
Camilla Wandahl
Myndabók. Mamma, babba og Erika eru í summarhúsi. Mamma og babba siga, at tey skulu skiljast. Erika rýmir út í skógin, har hon dettur og verður fangað av trøllagreinum. Til alla lukku verður hon funnin av mammu og babba, sum bera hana aftur til hús

## Samanførdar familjur













**Eg bestemmi**
Ingrid Olsson
Myndabók. Gentan og mamman skulu vitja Kára, sum er unnusti hjá mammuni. Gentan tímir ikki, tí tað er einki stuttligt at spæla við børnini hjá Kára. Men so finnur hon upp á eitt spæl, har hon kann bestemma yvir suttuni hjá lítla soninum hjá Kára.

**Leivur fær ein lítlan mammubeiggja**
Tiril Valeur
(reyð krabbabók)
Leivur ynskir sær ein mammubeiggja. Ein kulan og stuttligan ein, eins og Einar og Ívar hava. Men skal Leivur fáa ein mammubeiggja, má mamman fáa ein beiggja

**Lý**
Marie Duedahl
(reyð krabbabók)
Lý er glað. Í dag skal hon hitta nýggju systrina Fíu. Fía er 13 ár. Tað er kul at hava eina systur, sum er 13 ár. Ella er tað?

**Mamma fær sjeik**
Mette Egelund Olsen
(reyð krabbabók)
Mamman hevur fingið sjeik, men gentan vil ikki hava ein nýggjan pápa, tí hon hevur longu ein pápa

**Pludselig søskende**
Anja Hitz
Myndabók. Billy, sum gongur í barnagarði, býr saman við pápa sínum. Pápin hittir eina nýggja damu, Eriku. Hon eigur tvey børn, Karen og Markus, men Billy hevur ikki ynskt sær nýggj systkin

# Ættleiðing










**Kengulambið**
Diana Kimpton
Myndabók. Tað lítla lambið kennir seg so einsamalt og rópar maam-maa! Men so kemur ein kenguru, sum so fegin vil hava ein unga. Hon leggur tað lítla lambið í pungin og hoppar til hús. Men hvat hendir, tá ið tað lítla lambið varnast, at tað er so nógv øðrvísi enn mamman?

**Skal jeg fortælle dig om adoption? En guide til familie, venner og professionelle**
Anne Braff Brodzinsky (30.175)
Gentan Marie sigur frá, hvussu tað er at vera ættleidd, um kenslurnar og saknin, og hvussu onnur kunnu hjálpa børnum sum henni at kenna seg góðtikin

**Herman hører til hos os!**
Andrea Reitmeyer
Myndabók. Um pingvinina Herman, sum longu sum egg varð ættleiddur av einari kongapingvinfamilju. Men líkt er til, at Herman ikki er ein kongapingvin. Ein nemandi søga fyri 4-7 ára gomul børn

**Hvis baby?**
Stina Wirsén
Myndabók. Kettan er ættleidd. Tá hildu foreldrini hjá kettuni, at tey ikki sjálvi kundu fáa børn, men nú er kortini eitt barn í búkinum á mammu. Fara tey so eisini at geva tað barnið burtur?

**Joels familie**
Emma Adbåge
Myndabók. Drongurin líkist als ikki foreldrunum, og námsfrøðingurin sigur fyri hinum børnunum, at drongurin er ættleiddur og føddur í einum heilt øðrum landi

**Nu er det min tur - Noah er fra Etiopien**
Cecilia Hafezan Abel
Myndabók. Í skúlanum spyr Marie, hví Noah sær øðrvísi út. Heima seta mamma og Noah seg í sofuna og hyggja í myndaalbummið frá, tá mamma og babba vóru eftir Noah í Etiopia. Tí Noah er ættleiddur

**Rosita**
Pimm van Hest
Myndabók. Rosita er fimm ár, og hon líkist hvørki pápa ella mammu síni. Tá tey siga henni, at hon ongantíð hevur verið í búkinum á mammu, fær hon søguna um, hvussu tey trý gjørdust ein familja

## Ælabogafamiljur








**Familien Skov**
Kenneth Jakobsen Bøye
Smábarnabók. Í Skov-familjuni eru Vigga, lítlibeiggin og báðir pápar hennara. Summi kalla tey eina ælabogafamilju, men tey ganga mest í svørtum og gráum klæðum. Kanska er Gud eisini partur av familjuni, tí Gud er sum ein pápi. Men hvussu nógvar pápar kanst tú hava? Til 8-10 ára gomul børn

**Far og far og lille Tango**
Edith Schreiber-Wicke
Myndabók. Kallpingvinirnar Roy og Silo leggja einki í kvennpingvinirnar. Í staðin byggja teir eitt felags reiður og skiftast um at bøla einum steini. Tá ein kvennpingvin noktar at bøla sínum eggi, leggja djóraansararnir eggið í reiðrið hjá Roy og Silo. Søgan byggir á eina veruliga hending í djóragarðinum í New York

**Hej Gustav Gravhund!**
Bette Westera
Myndabók. Gustav Gravhundur er ein hundahvølpur, sum hugnar sær saman við mammuni og systkjunum. Ein dagin kemur ein menniskjafamilja og tekur hann við til hús. Gustav er bangin, men til alla lukku skilir gentan Sarah, hvussu Gustav hevur tað

**Hele familien**
Miriam Schiffer
Myndabók. Sofie býr í einari ælabogafamilju saman við pápa sínum og sjeikinum hjá pápanum, Palle, men hvønn skal hon taka við, tá tey skulu halda mammudag í flokkinum?

**Pelles piratmødre**
Jodie Lancet-Grant
Myndabók. Pelle heldur mammur sínar vera flovisligar, tí tær ganga altíð í sjórænaraklæðum og syngja sjómansvísur. Hann hevði ynskt, at familja hansara var líka sum allar aðrar familjur. At lesa upp fyri 5-7 ára gomlum børnum. Leggur upp til samrøðu um ymisk sløg av familjum

**Pigefest - for Søren!**
Ane Gudrun
Myndabók. Tulle vil sleppa at halda føðingardag. Eina mega ljósareyða gentuveitslu við einhyrningum og glimmuri, men hon hevur onga mammu, bara ein pápa og ein Søren, so hvat skal hon gera?

## Donorfamiljur







**Hvem er Tristans far?: Tristan er donorbarn**
Cecilia Hafezan Abel
Myndabók. Í familjuni hjá Tristan eru tey Tristan og mammu. Eingin pápi. Tristan er donorbarn, og hann fer skjótt at fáa eina systur

**Karla ønsker sig en far**
Pia Olsen
Myndabók. 6 ára gamla Karla hevur ongan pápa, tí mamma hennara hevur fingið hana saman við einum sáðdonori. Hóast nógv fitt fólk eru rundan um Karlu, leingist henni kortini eftir einum pápa

**Martines far**
Mette Døssing Hviid
Myndabók. Martine er donorbarn og býr einsamøll saman við mammu síni. Martine sær, at onnur børn hava bæði ein pápa og eina mammu, og er farin at undrast á, hví hennara familja er minni. Til alla lukku fáa Martine og mamman eitt gott prát um at vera donorbarn og um ymisk sløg av familjum. Myndabók fyri 3-6 ára gomul børn

## Fosturfamiljur




**Jeg er plejebarn**
Kristien Dieltiens
Myndabók. At vera tikin úr sínari biologisku familju er ikki lætt. Men tað kann eisini vera trupult at koma at trívast í einari nýggjari fosturfamilju – bæði fyri barn, foreldur og systkin

**Thomas og Peter kommer i plejefamilie**
Inger Thormann (foreldrahill)
Myndabók. Thomas og lítlíbeiggin Peter skulu flyta úr barnaheiminum til eina fosturfamilju. Teimum dámar ikki nýggju støðuna, men tað broytist, tá teir spakuliga koma at kenna nýggju familjuna